# BankNordik eitt lítið avlop

**Lítil lánihugur og størri afturgjaldsvilji merkja, at útlánini í BankNordik minkaðu úr 8,7 niður í 8,4 milliardir fyrsta ársfjórðing í ár. Millum annað hetta merkir, at bankin hevur eitt avmarkað avlop á sjey milliónir krónur at vísa á fyrsta ársfjóring**

Leo Poulsen

Í sambandi við at BankNordik kunngerð roknskapin fyri fyrsta ársfjórðing í ár siga teir eisini, at teir tillaga deildarnetið hjá bankanum. Men fleiri orsøkir verða nevdar til avmarkaða avlopið.

Varsemið í eftirspurninginum eftir kreditti kom óvart á okkum. Samstundis høvdu vit framvegis ov nógv avlopsgjaldføri og tilhoyrandi rentuútreiðslur í fyrsta ársfjórðingi. Á báðum økjum nærkast vit tó við stórum fetum eini betri støðu. Í fyrsta ársfjórðingi afturrindaði bankin 1,5 milliardir krónur í bankalánum. Vit merkja ein vaksandi áhuga frá kundunum at læna, tí rokna vit við útlánsvøkstri tað, sum eftir er av árinum, sigur Janus Petersen, forstjóri í BankNordik.

Bankin hevði eitt avlop fyrsta ársfjórðing í fjør á heilar 411 milliónir krónur, men 380 at milliónunum stavaðu frá søluni av Bakkafrost.

BankNordik hevði eisini eitt kurstap á 17 milliónir krónur í sambandi við gjaldføringsplaseringina. Hinvegin er gjaldførið gott og solvensurin høgur.

### Tillaga deildarnetið

Men bankin boðar eisini frá niðurskurði og uppsagnum. Í Føroyum verður virksemið hjá BankNordik framyvir miðsavnað í fimm deildir. Virksemið í Eysturoynni verður miðsavnað í Saltangará. Hetta inniber at alt virksemið í deild bankans í Fuglafirði verður flutt til Saltangará. Virksemið í Streymoynni og á Sandi verður miðsavnað í Havn. Hetta inniber at alt virksemið í deildunum í Kollafirði, Vestmanna og Sandi verður flutt til Havnar.

- Okkara kundar eftirspyrja í alsamt størri mun haldgóða ráðgeving um lán, íløgur, eftirløn og tryggingar. Fyri at styrkja hesa ráðgeving er neyðugt við størri deildum, sum kunnu bjóða eitt spennandi fakligt umhvørvi við nógvum avbjóðingum fyri einstaka starvsfólkið. Vit harmast um, at umskipanin av deildarnetinum hevur við sær, at fólk mugu úr starvi, sigur John Rajani, stjóri í BankNordik.

Eftir umskipanina fer BankNordik at hava fimm deildir kring landið. Tær verða í Havn, Klaksvík, á Tvøroyri, í Saltangará og Miðvági. Á hesum deildum verða kundarøktin og kundaráðgevingin styrktar við umskipanini.




*BankNordik hevur eitt avmarkað avlop at vísa á fyrsta ársfjórðing av 2011*

# Klárt til festdag í morgin

**Í dag verður seinasta slitlagið av asfalti lagt á nýggju ferjuleguna í Nólsoy, so nú er klárt til avhandanina, sum verður seinnapartin í morgin**

Leo Poulsen

Ferjulegan í Nólsoy gjørdist liðug til tíðina.

Seinasti avhendingardagur varð ásettur til 20. mai, og tað gongur akkurát.

- Avrátt er, at ferjulegan skal handast til kommununa í morgin 19. mai. Tað verður lítið hátíðarhald, har eg sum formaður í havnarnevndini fari at siga nøkur orð, vit fara at klippa ein snór og so verður annars boðið til ein bita við onkrum leskandi afturvið, sigur Jákup Símun Simonsen, formaður í havnarnevndini.

Ætlanin er, at Ternan túrin klokkan 16.20 av Havnini skal leggja at við nýggju ferjuleguna, og eftir hátíðarhaldið verða nólsoyingar og fólk annars boðin umborð á Ternuna til ein breyðbita.

Í sambandi við ferjuleguna hevur havnarnevndin eisini avgjørt at taka niðasta egningarskúrðin og gjørt hann um til bíðirúm. Bíðirúmið hevur alt tað, sum eitt bíðirúm skal hava við WC, stólum og borðum. Hetta verður tikið í nýtslu samstundis.

Í gjár byrjaði Articon at flyta tilfar av oynni aftur. Tá vóru teir lidnir við sítt arbeiði. Tað sum nú er eftir, er at asfaltera økikð við ferjuleguna, og tað byrjaði EM Asfalt upp á í gjár.

Í morgun var bert seinasta slitlagið eftir at leggja á, og tí komu bilar út við í morgun.

Tað eydnaðist ikki at fáa orðið á Jákup Enni, sum hevur staðið fyri arbeiðinum fyri Articon. Hann er staddur uttanlands í løtuni. Men sum skilst á monnum, sum hava arbeitt upp á ferjuleguna, hevur vánaliga veðrið í vetur kostað teimum 16 arbeiðsdagar.

Sum nevnt var seinasta freist til tess at avhenda arbeiðið til tíðina fríggjadagin.



*Í morgun mangladi bara at leggja seinasta slitlagið á til tess at gera asfaltarbeiðið liðugt*

Mynd: Leo Poulsen